Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Høgni Hoydal, løgtingsmaður

Svarari: Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum

Evni: Persónlig sambond og flyting av feløgum í viðgerð og avgerðum um játtan til kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir

Spurningar:

1. Kann landsstýrismaðurin vátta ella avsanna, at tingfólk í samgonguni og/ella landsstýrisfólk hava verið persónliga uppi í umsóknum til vinnuligar royndir og verkætlanir, harundir ítøkilig skipakeyp og ískoytiskvotur?

2. Kann landsstýrismaðurin vátta ella avsanna, at tingfólk í samgonguni og ella/landsstýrisfólk hava nærstandandi (skilmarkað sum í fyrisitingarlógini), sum eru uppi í umsóknum til vinnuligar royndir og verkætlanir, harundir ítøkilig skipakeyp og ískoytiskvotur?

3. Kann landsstýrismaðurin vátta ella avsanna, at tingfólk í samgonguni hava verið advokatar ella í sínum privata arbeiði ella ognarviðurskiftum annars hava havt ávirkan á umsóknir?

4. Um svarið er játtandi, hvørji persónlig, vinnulig ella ognarlig sambond er talan um?

5. Kann landsstýrismaðurin vátta ella avsanna, at eitt av feløgunum, ið hevur fingið játtan til skipakeyp, fyrst varð skrásett í Tórshavn, og síðan flutt til Vágs, langt eftir, at umsóknir skuldu verið inni?

Viðmerkingar:
Alment eru fleiri ivamál og ávísingar av persónligum sambondum hjá fólki í samgonguni/landsstýrinum reist í sambandi við játtanirnar til vinnuligar royndir og verkætlanir, harundir ítøkilig skipakeyp.

Til tess at varpa ljós á hesar spurningar og geva landsstýrismanninum høvi at greiða frá ella avsanna, verður fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 28. september 2021

Høgni Hoydal